# Kór úr Noregi á vitjan

**Mikudagin í næstu viku fáa vit forvitnisliga vitjan av einum kóri í Noregi. Tá kemur St. Laurentiuskórið á vitjan**

KÓRVITJAN
*Stefan í Skorini*

Kórið verður í Føroyum frá mikudegnum 26. juni til 1. juli. Kórið fer at hava tvær konsertir í Føroyum. Tann eina verður í Vesturkirkjuni í Havn hóskvøldið 27. juni kl. 19, og hin verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum sunnudagin 30. juni kl. 16. Konsertin á Toftum verður við luttøku frá Eystankórinum.

Kórið er eitt blandað kór, sum fevnir um fólk úr tíggju ára aldri og upp til 60 ár. Kórið er stórt og hevur einar 100 virknar limir. Kórið er sera virkið og hevur ein hóp av konsertum og framførslum á baki. Tað hevur ferðast víða um í Evropa og hevur vitjað í teimum flestu londunum frá gamla Jugoslavia til Írland og nú eisini í Føroyum. St. Laurentiuskórið samstarvar eisini við yrkistónleikarar.

Kórið varð sett á stovn allahalganadag í 1964, tá Kjell W. Christiansen hevði fyrstu framførsluna við nýstovnaða kóri sínum í Løvensborg kirkjuni, sum er fra 1200-talinum. Árið eftir fekk kórið navn eftir St. Laurentius, sum er verndarhalgimenni hjá Løvensborg kirju.

Tónlistarliga spennir kórið víða og spælir alt frá miðaldar- og gregoriansk-um kirkjutónleik til meira nýmótans musicals. Kórið hevur tó støðið í klassiskum kirkjutónleiki. St. Laurentiuskórið hevur sungið inn á plátu og givið út eina fløgu við jólaløgum.



*Sunnudagin 30. juni verður Fríðrikskirkjan á Toftum karmur um konsert hjá St. Laurentiuskórinum úr Noregi, sum fer at hava tvær konsertir í Føroyum*

Kjell W. Christiansen er útbúgvin sangpedag, og hann hevur stjórnað kórinum frá byrjan av. Kórið hevur eina heimasíðu, sum liggur á www.laurentiuskoret.org.

## Smágenta bitin av hundi

HUNDABIT
*Stefan í Skorini*

Sunnukvøldið varð ein 10 ára gomul genta álopin av einum hundi á Húsum á Kalsoynni. Til alla lukku var gentan í einum tjúkkum dýnujakka, og hetta forðaði fyri, at gentan fekk nakran álvarsligan skaða av álopinum.

Merkir av tonnunum síggjast í vinstru síðu, men hundurin hevur ikki bitið seg ígjøgnum jakkan.

Hundurin, sum er av slagnum collie, er longu avlívaður. Hví hundurin leyp á, veit løgreglan ikki.

## Innbrot í Barok

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina hava óbodnir gestir brotið inn í diskotekið Barok í Klaksvík. Tjóvarnir brutu rútin í høvuðsinngongdini, sum vendir út ímóti vegnum og tóku tveir kassar av øli og átta fløskur av brennivíni.

Sjey fløskur og báðir kassarnir vóru tó funnir aftur við trappuna sunnanfyri Norðoya Apotek, sum liggur hinumegin vegin. Sostatt fingu tjóvarnir bert eina fløsku av brennivíni við sær. Løgreglan hevur onga ábending um, hvør gerningsmaðurin er.

## 60 ára gomul tikin fyri stuldur

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygardagin eftir middag sendu starvsfólk úr Miklagarði boð eftir løgregluni. Tey høvdu varnast eina 60 ára gamla konu, sum hevði lagt vørur í eina tasku uttan at gjalda fyri tær. Talan var um vørur fyri 281 krónur. Konan er skuldsett fyri stuldur, og hon kann vænta sær eina bót.

Løgreglan hevur annars havt ein hampuliga friðarligt vikuskiftið. Sundalagsstevnan var í Hósvík, men løgreglan hevur ikki merkt tað stóra til hesa stevnuna. Ferðsluløgreglan syrgdi fyri, at ferðslan gekk, sum hon skuldi, og skrivaði annars nakrar parkeringsbøtur.

# 25 nýggir lærarar



*Á samkomu í skúlaauluni á Føroya Læraraskúla á ársins longsta degi, fríggjadagin, fingu 25 nýggir lærarar prógv. Nýggju lærararnir eru hesir:*
*Aftast frá vinstru: Harriet Poulsen, Mariann Poulsen, Mariann Stenberg Poulsen, Olly Poulsen, Guðrið Samuelsen, Ingun Schiller, Karina Toftegaard og Astrid McDonald.*
*Í miðjuni: Eilin Jørgensen, Anni Korsgaard, Anja Mortensen, Bjarma Mortensen, Aslaug Olsen, Jóhannis Petersen og Jógvan Jón Petersen.*
*Fremst frá vinstru: Katrin Bech, Erik Biskopstø, Búi Dahl, Jan Dam, Tóra Hansen, Hans Petur Jacobsen, Durita Jakobsen, Guttorm Jakobsen og Rói Joensen.*

# Leiðari settur í hesi vikuni

STARV
*Stefan í Skorini*

Barnaheimið í Havn fer væntandi at fáa nýggjan leiðara í hesi vikuni. Tað upplýsir Fríða Patursson, sum er formaður í nevndini.

Lýst hevur verið eftir nýggjum leiðara, men ov fáar umsóknir komu inn. Tí gjørdi nevndin av at søkja av nýggjum. Hesuferð hilnaðist betri og fýra umsóknir vóru at velja ímillum.

Seinasta árið hevur Mirjam Johannesen verið virkandi leiðari á Barnaheiminum, síðan Sólrun Jacobæus fór úr tí starvinum.

Nú skal nýggjur leiðari finnast, og tað verður væntandi avdúkað í hesi vikuni.

# Lasse S framsýning í Stokkhólmi

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Føroyski listamaðurin Lasse S úr Sørvági luttekur í hesum døgum á eini listaframsýning í svenska høvuðsstaðnum, Stokkhólmi.

Undir heitinum »Natur-Reflektioner« lat stórfingna listaframsýningin upp leygardagin 15. juni á Naturhistoriska Riksmuseet í Stokkhólmi. Framsýningin er opin til 18. august, og við á henni eru málningar, sum listafólk úr Norðurlondum hava gjørt.

Lasse Sørensen, sum vanliga verður nevndur Lasse S, er einasti føroyingurin, sum er umboðaður á framsýningini. Hann hevur seks málningar við á framsýningini, sum bara hevur málningar, ið avmynda náttúruna.



Tórshavnar kommuna:

# Sparir eina millión

**Tórshavnar kommuna sparir eina millión, nú Rás Tórshavn er á veg á aðrar hendur. Býráðið hevur tryggjað, at borgararnir fáa eitt eins gott úrval frá Føroya Tele sum í verandi skipan**

RÁS TÓRSHAVN
*Heri á Rógvi*



*Hesar eru í dag kommunalar, men tað vera teir ikki leingi afturat, tá Føroya fer at yvirtaka tær og Rás Tórshavn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur tað vera endaliga staðfest av einum samdum býráð, at ókeypis fylgissveinasjónvarp til borgararnar er ein farin tíð. Júst hvussu ókeypis tað er, liggur upp til einkultu tulkingar. Sum nú er gjalda skattgjaldararnir í Tórshavnar kommunu eina millión krónur á fíggjarætlanini hjá kommununi fyri at hava Rás Tórshavn á skíggjanum .

Rás Tórshavn byrjaði síðst í áttatiárunum at senda fylgissveinasjónvarp til borgarar í Tórshavnar Kommunu (Eisini Argir, sum tá ikki var partur av kommununi). Tað gekk upp á stás fyrstu árini, men so komu trupulleikarnir.

Fyrst var tað MTV, sum fekk ungdómin í høvuðsstaðnum at reisast og savnast í mótmælisgongu móti stongingini av tónleikarásini. Býráðið mátti bara geva ungdóminum tí honum lysti, og MTV kom aftur á skíggjan, men býráðið mátti gjalda fyri at senda rásina. Síðani gjørdist BBC World Service til tvær rásir: Prime og World. Í fleiri ár var stríð um, hvørja av hesum rásunum havnarborgarar skuldu sleppa at síggja, og endin gjørdist, at enn ein meirkostnaður skuldi gjaldast fyri Rás Tórshavn, tí BBC kostaðu eisini at senda. Sostatt gjørdist útboðið fimm rásir, og harav vóru tvær teirra ókeypis. Hetta vardi tó ikki alt ov leingi. Seinasta kapitlið av søguni um Rás Tórshavn varð skrivað, tá Viasat, sum eigur rásina TV3, gav Tórshavnar Kommunu fráboðan um, at nú skuldi kommunan gjalda fyri at senda TV3.

Hetta gjørdist samstundis banasárið hjá Rás Tórshavn, tí kostnaðurin vildi veksa við einum 800.000 kr. árliga, og hetta kendi kommunan seg ikki føra fyri at gjalda. Samstundis varð eisini ásannað, at tíðin við ókeypis rásum var ein farin tíð.

Nógv hevur verið at hoyrt, lisið og sæð um Rás Tórshavn, sum hevur havt ótrúliga stóran týdning fyri borgarar í Havnini.

Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at teir eru vitandi um týdningin, ið Rás Tórshavn hevur havt og hevur, men teir mugu ásanna, at tíðirnar eru broyttar. Kommunalatilboðið, ið ikki er at síggja aðrastaðni í heiminum, hevur sín uppruna í, at parabol anntennur hóttu við at festa seg á hvørja tekju í kommununi, og hetta vildi kommunan ikki lata sær lynda.

— Tað vóru aðrar tíðir tá. Parabolútgerðin kostaði nógvar túsund krónur, og sjálvar skálirnar vóru eina manshædd í ummáli. Nú eru anntennurnar munandi minni, og kostnaðurin er samstundis eisini nógv minni.

Vit eru tó fullvitandi um, at fólk hava verið ótrúliga glað fyri Rás Tórshavn, men vit hava ikki merkt nakra misnøgd, nú Rás Tórshavn skjótt ikki verður til longur í verandi líki, sigur Jan Christiansen.

### Líknandi tilboð

Sum teimum flestu kunnugt, er tað Føroya Tele, sum skal "yvirtaka" Rás Tórshavn. Síðani Rás Tórshavn byrjaði at senda, hevur Føroya Tele (áður TFL) umsitið sendiútgerðini fyri Tórshavnar Kommunu.

—Tískil var tað ógvuliga natúrligt, at Føroya Tele tók yvir, sigur Jan Christiansen.

Føroya Tele hevur í longri tíð arbeitt við einari ætlan, sum snýr seg um at bjóða fylgissveina rásir út til borgarar í Havnini og mest sannlíkt eisini aðrastaðni í Føroyum.

Talan skal vera um sama útbreiðsluhátt í Havnini, so sleppast kann undan teimum umtalaðu parabolunum á húsaveggjunum. Hvørt húskið sær fær møguleikan at ogna sær ein sokallað boks, ið umbrýtur tað talgilda signalið til myndir á skíggjanum.

— Vit hava tryggjað okkum, at borgarnir fáa eitt eins gott tilboð, sum teir longu fáa. Tað vil siga, undirhald, ítrótt, mentan v.m., sigur Jan Christiansen.

Tað verður talan um ein programmpakkar av onkra slag, ið Føroya Tele fer at bjóða út við einum úrvali av rásum.

Eftir hvat skilst, so verður TV3 sent ókeypist út so leingi samráðingar eru millum teir og Føroya Tele.

Eisini yvirtekur Føroya Tele alla útgerðina, sum kommunan áður hevur átt.

Andras Róin sigur, at teir arbeiða við málinum í seinni í vikuni koma teir at almannakunngera ein part av ætlanunum.

# Øll nevndin í KT-felagnum útskift

**Eingin í sitandi nevndini valdi at stilla uppaftur, og tískil var nýggj nevnd vald á aðalfundinum hjá KT-felagnum, ið var hildin fríggjadagin 21/6.**

TÍÐINDASKRIV

Esbern Hansen, sum hevur verið formaður síðani felagið var stovnað, gjørdi greitt, at hann ikki ynskti at halda fram, tí hetta tvey ára skeiðið hevur verið sera arbeiðskrevjandi, og at tað gekk út yvir egna felag hansara. Hinir báðir nevndarlimirnir Una Joensen og Jóhan D. Heinesen ynsktu heldur ikki at halda fram.

Á fundinum var tí nýggj trýmannanevnd vald. Í nýggju nevndini sita Robert Vilhelmsen, Ólavur Ellefsen og Sjúrður Horsdal. Micael Thomsen er valdur sum eykalimur.

Ársfrágreiðing felagsins frá farna ári var løgd fram á aðalfundinum, og hon er tøk her á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum – www.industry.fo

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu

Citroen Jumper CH. v/last
km. 120.000, árg. aug. 1998
v/mvg 130.000,-

Citroen Xsara 1,6i 5h
km. 30.000, árg. feb. 1998
107.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi 5H
km. 90.000, árg. nov. 1999
145.000,-

Citroen Xantia 1,9TD 5h
km. 60.000, árg. feb. 1998
118.000,-

Citroen Xantia 1,8i 16V 5h
km. 63.000, árg. okt. 1996
112.000,-

Citroen ZX 1,9D stc.
km. 89.000, árg. mars 1996
86.000,-

Citroen Berlingo 1,9D 4h
km. 81.000, árg. sept. 1998
109.000,-

Mitsubishi Galant 2,0
km. 150.000, árg. juni 1992
37.000,-

Mitsubishi L300 2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
v/mvg 70.000,-

Mitsubishi Pajero 2,8TDi
km. 82.000, árg. sept. 1997
v/mvg 177.000,-

Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h
km. 35.500, árg. aug. 1999
115.000,-

Mazda Demio 1,3 5h
km. 50.000, árg. feb. 1999
99.000,-

Nissan Terrano 2,7TDi
km. 71.000, árg. nov. 1997
v/mvg 133.000,-

Hyundai Accent 1,3LS
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Ford Escort 1,6i 16V van
km. 102.000, árg mars 1997
53.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar
Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820